# MEIRA ENN 1000 DAGAR Í FONGSLI FYRI MYNDATØKU

# EGYPTALAND

## SHAWKAN




**Støðan var spent í miðbýnum í Kairo tann 14. august 2013. Á gosi um, at stjórnin hevði koyrt tann undanfarna forsetan frá, fyltu mótmælisfólk eitt alment torg. Politiið var vápnað við táragassi, patrónum og stríðsvognum.**

Myndajournalisturin Mahmoud Abu Zeid, betur kendur sum Shawkan, var mitt í rokinum og tók myndir av ruðuleikanum.

Brádliga kyknaði harðskapur rundan um hann. *"Tað var sum í einum hollywoodfilmi,"* segði Shawkan. *"Tað kendist, sum vóru mitt í einum kríggi."* Men patrónirnar vóru veruligar. Táragassið var veruligt. Og stríðsvognarnir, sum herjaðu á mótmælisfólk um alt Egyptaland, vóru veruligir. Trygdarherlið drupu 1.000 fólk henda dagin.

Tá ið politiið kom eftir, at Shawkan var journalistur, varð hann tikin og bakbundin við plaststrimlum, sum skóru ígjøgnum húðina á honum og góvu honum blóðutar skøvningar. Hann var sligin og pískaður við einum belti, og einaferð varð sveiggjað við einum beltisspenni beint framman fyri eygunum á honum.

Fyri at taka myndir varð Shawkan handtikin, píndur og settur í varðhald. Hann er, millum nógv annað, ákærdur fyri *"at órógva tann almenna friðin"* og *"at vera partur av einum brotsmannaliði".* Rættarmálið er í gongd. Verður hann dømdur sekur, kann hann verða dømdur til deyða.

Í dag er Shawkan í Tora-fongslinum í Kairo. Fongslið er víðagitið fyri ótolandi umstøður. Hóast hann hevur hepatitis C, fær hann ikki ta læknahjálp, honum tørvar.

**Tað eru nú liðin trý ár, síðan Shawkan varð settur í varðhald. Í rættinum í mai segði hann við dómaran: *"At taka myndir er eingin brotsgerð."* Hann hevur púra rætt. Heit á Egyptaland um at sleppa øllum ákærum ímóti Shawkan og sleppa honum leysum beinanvegin.**

# ÁHEITANARBRØV

## Skriva tí almenna ákæranum eini boð.

**Byrja við: ”Dear Counsellor,”**

- Sig, hvør tú ert, og hví tað ørkymlar teg, at Mahmoud Abu Zeid, ella Shawkan, situr í varðhaldi.
- Bið hann við tínum egnu orðum sleppa øllum ákærum mót Shawkan og sleppa honum leysum beinanvegin.

Dear Counsellor.

I am writing to express my concern about the ongoing detention of photojournalist Mahmoud Abu Zeid, or Shawkan, following his arrest in August 13, 2013 in Cairo.

I believe the charges against Shawkan are unjustified. Taking pictures is not a crime.

I ask you to ensure that all charges against Shawkan are dropped and that he is released without delay.

Sincerely,

## Send boðini higar:

Nabil Sadek

Office of the Public Prosecutor

Madinat Al-Rihab

New Cairo, Egypt

# SAMHUGABRØV

## Vís Shawkan, at hann ikki er einsamallur.

Skriva ella tweeta eini stuðulsboð til frama fyri Shawkan. Hann vil kanska vita, hvat talufrælsi hevur at siga fyri teg.

Free Shawkan<br>
Ahmed Abu Seif<br>
211 E. Ohio St. Apt #2523<br>
Chicago, Illinois 60611, USA



## ÁHEITANARBRØV

**Endamálið** við einum áheitanarbrævi er at fáa móttakaran at fremja eina gerð, ið ger at rættindini hjá einum øðrum menniskja verða hildin. Ofta verða áheitanarbrøv send til myndugleikapersónar sum t.d. kongalig, forsetar, forsætisráðharrar ella borgmeistarar, tí hesir persónar hava skyldu til at taka sær av teimum brotum, sum henda.

**Orðaval -** í einum áheitanarbrævi hevur stóran týdning fyri um móttakarin tekur brævið í álvara. Tað er umráðandi at vera fólkaligur, óansæð hvat móttakarin hevur gjørt, ella kanska ikki hevur gjørt.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.** Brúka bara heitið á móttakaranum, t.d. Tygara kongaliga hátign, Frú forseti ella Hr. borgmeistari.

**Inngangur -** Stutt frágreiðing um endamálið við brævinum.

**Áheitan -** Kann eisini nevnast høvuðsteksturin í brævinum. Her verður greitt frá trupulleikanum og grundgevingunum fyri at móttakarin eigur at hjálpa við at loysa teir.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**

## SAMHUGABRØV

**Endamálið** við einum samhugabrævi er at geva móttakaranum eina vón og eina trúgv uppá at hansara ella hennara stríð fyri rættvísi fer at eydnast. Brævið vísir móttakaranum at hann ella hon ikki eru gloymd og ikki stríðast einsamøll, men at umheimurin gevur sær far um tey brot, ið ganga fyri seg og stríðist fyri at mannarættindini hjá móttakaranum verða hildin.

**Innihaldið -** Tað eru nógvir møguleikar fyri hvat tú kanst skriva í einum samhugabrævi, og hvussu tú kanst skriva tað. Tú kanst skriva stutt ella langt. Tekna eina mynd ella skriva eina yrking. Tað er púra upp til sendaran at royna at meta um, hvat hann heldur at móttakarin hevur brúk fyri at hoyra. Tann, ið fær eitt samhugabræv er ofta tann persónurin, sum er fyri brotum á mannarættindini.

Brævið kann eisini sendast til avvarandi hjá persóninum, sum er fyri brotum. Tað vil siga familju, vinir og líknandi. Í nøkrum førum er tað ikki gjørligt at senda samhugabrøv beinleiðis persónin, sum er fyri brotum, tí myndugleikarnir, ið standa fyri brotunum forða fyri tí.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.**

**Innihald -** Hygg at frágreiðingini omanfyri.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir ella Kærar heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**